





**Ein Arne Jacobsen** sum man faktiskt hevur ráð at keypa. Hetta mini Eggið er 6,7 centimetrar høgt og fitt at hava sum pynt ella til eitt luksus dukkuhús.

# Danskt design

TAÐ ERU LÍKA NÓGVAR MEININGAR UM **DANIR**, SUM TAÐ ERU **FØROYINGAR** TIL. MEN ÓANSÆÐ HVAT VIT HALDA, SO ER EITT VÍST – DANIR DUGA **DESIGN**! HER ERU NAKAÐ AV TÍ, SUM FAVORITTARNIR, **STELTON**, **BODUM**, **ROSENDAHL** OG **ARNE JACOBSEN** HAVA GJØRT Í SEINASTUNI. PLUS NÝGGI FAVORITTURIN **POUL PAVA**.

**Rosendahl goes color** kann man kalla hesi gløsini. Rosendahl er vælkent í Føroyum, men tað eru tað hvíta postalínið og kláru gløsini, sum tey flestu hava í køksskápinum. Nú eru hesi litføgru gløsini komin í Grand Cru seriuni.






**Nýggja serian** hjá Bodum - Bistro er litrík, og hevur silikonhylki uttaná stálmiðjuni.

**Kaffikannuna** frá Stelton kenna tey flestu av okkum aftur. Nú er sama kanna komin sum pressikanna, so, at til ber at gera pressikaffi í henni.



**Poul Pava** er danskur listamaður, ið arbeiðir á Bornholm við síni barnsligu og naivistisku list. Nú er hansara list eisini at finna á skálum og gløsum.

